## Vodafonedeildin, 6. umfar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7. mai | kl. 18.00 | **NSÍ - EB/Streymur** | Páll Augustinussen |
| 9. mai | kl. 14.45 | **FC Suðuroy - B36** | Eiler Rasmusen |
| | kl. 15.00 | **HB - B68** | Petur Reinert |
| | kl. 15.00 | **Víkingur - B71** | Ransin Djurhuus |
| | kl. 17.00 | **AB - ÍF** | Rúni Gaardbo |

### Føroyska **Vodafonedeildin** deildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 5 | 3 | 2 | 0 | 11 | 5 | +6 | 11 |
| 2 | HB | 5 | 3 | 2 | 0 | 9 | 6 | +3 | 11 |
| 3 | B68 | 5 | 3 | 0 | 2 | 13 | 9 | +4 | 9 |
| 4 | Víkingur | 5 | 2 | 2 | 1 | 12 | 10 | +2 | 8 |
| 5 | ÍF | 5 | 1 | 3 | 1 | 5 | 5 | 0 | 6 |
| 6 | EB/Streymur | 5 | 1 | 2 | 2 | 6 | 6 | 0 | 5 |
| 7 | FC Suðuroy | 5 | 1 | 2 | 2 | 9 | 11 | -2 | 5 |
| 8 | B71 | 5 | 1 | 2 | 2 | 7 | 13 | -6 | 5 |
| 9 | NSÍ | 5 | 1 | 1 | 3 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 10 | AB | 5 | 0 | 2 | 3 | 9 | 15 | -6 | 2 |

### Føroyska **1. Deild** *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 07 Vestur | 5 | 4 | 1 | 0 | 9 | 3 | +6 | 13 |
| 2 | HB II | 5 | 3 | 0 | 2 | 11 | 9 | +2 | 9 |
| 3 | KÍ | 5 | 2 | 2 | 1 | 10 | 5 | +5 | 8 |
| 4 | EB/Streymur II | 5 | 2 | 2 | 1 | 6 | 6 | 0 | 8 |
| 5 | Víkingur II | 5 | 2 | 1 | 2 | 11 | 11 | 0 | 7 |
| 6 | TB | 5 | 2 | 1 | 2 | 7 | 8 | -1 | 7 |
| 7 | AB II | 5 | 2 | 0 | 3 | 7 | 8 | -1 | 6 |
| 8 | FC Hoyvík | 5 | 1 | 2 | 2 | 5 | 5 | 0 | 5 |
| 9 | NSÍ II | 5 | 0 | 3 | 2 | 4 | 7 | -3 | 3 |
| 10 | B68 II | 5 | 0 | 2 | 3 | 2 | 10 | -8 | 2 |

### Føroyska **1. Deild** *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 4 | 4 | 0 | 0 | 28 | 2 | +26 | 12 |
| 2 | AB | 5 | 3 | 0 | 2 | 21 | 5 | +16 | 9 |
| 3 | Skála | 4 | 3 | 0 | 1 | 12 | 4 | +8 | 9 |
| 4 | Víkingur | 5 | 3 | 0 | 2 | 8 | 6 | +2 | 9 |
| 5 | EB/Streymur | 5 | 0 | 1 | 4 | 3 | 23 | -20 | 1 |
| 6 | MB | 5 | 0 | 1 | 4 | 3 | 35 | -32 | 1 |

### Enska **Barclays Premier League**

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 37 | 26 | 5 | 6 | 95-32 | 83 |
| 2 | Manchester United | 37 | 26 | 4 | 7 | 82-28 | 82 |
| 3 | Arsenal | 37 | 22 | 6 | 9 | 79-41 | 72 |
| 4 | Tottenham | 37 | 21 | 7 | 9 | 65-37 | 70 |
| 5 | Manchester City | 37 | 18 | 12 | 7 | 72-44 | 66 |
| 6 | Aston Villa | 37 | 17 | 13 | 7 | 52-38 | 64 |
| 7 | Liverpool | 37 | 18 | 8 | 11 | 61-35 | 62 |
| 8 | Everton | 37 | 15 | 13 | 9 | 59-49 | 58 |
| 9 | Birmingham | 37 | 13 | 11 | 13 | 37-45 | 50 |
| 10 | Stoke | 37 | 11 | 14 | 12 | 34-44 | 47 |
| 11 | Blackburn | 37 | 12 | 11 | 14 | 40-55 | 47 |
| 12 | Fulham | 37 | 12 | 10 | 15 | 39-42 | 46 |
| 13 | Sunderland | 37 | 11 | 11 | 15 | 47-54 | 44 |
| 14 | Bolton | 37 | 9 | 9 | 19 | 40-66 | 36 |
| 15 | Wigan | 37 | 9 | 9 | 19 | 37-71 | 36 |
| 16 | Wolverhampton | 37 | 8 | 11 | 18 | 30-55 | 35 |
| 17 | West Ham | 37 | 8 | 10 | 19 | 46-65 | 34 |
| 18 | Hull | 37 | 6 | 11 | 20 | 34-75 | 29 |
| 19 | Burnley | 37 | 7 | 6 | 24 | 38-80 | 27 |
| 20 | Portsmouth | 37 | 7 | 7 | 23 | 34-65 | 19 |

**Føroyskir leikarir:** *Gunnar Nielsen (Manchester City)*

### Danska **SAS-Ligaen**

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC København | 31 | 20 | 5 | 6 | 58-19 | 65 |
| 2 | OB | 31 | 16 | 8 | 7 | 42-31 | 56 |
| 3 | Esbjerg fB | 31 | 13 | 10 | 8 | 45-39 | 49 |
| 4 | AaB | 31 | 13 | 8 | 10 | 36-28 | 47 |
| 5 | Brøndby IF | 31 | 13 | 7 | 11 | 52-49 | 46 |
| 6 | FC Midtjylland | 31 | 13 | 5 | 13 | 42-47 | 44 |
| 7 | FC Nordsjælland | 31 | 12 | 6 | 13 | 37-37 | 42 |
| 8 | Silkeborg | 31 | 11 | 7 | 13 | 45-48 | 40 |
| 9 | SønderjyskE | 31 | 10 | 8 | 13 | 30-34 | 38 |
| 10 | Randers FC | 31 | 9 | 10 | 12 | 33-39 | 37 |
| 11 | AGF | 31 | 9 | 8 | 14 | 35-44 | 35 |
| 12 | HB Køge | 31 | 3 | 6 | 22 | 29-69 | 15 |

**Føroyskir leikarir:** *Christian Lamhauge Holst (Silkeborg)*



*Mynd: Polfoto*

# Einki Champions League til Gunnar

**PREMIER LEAGUE** Manchester City misti mikukvøldið møguleikan fyri at spæla Champions League fótbólt komandi kappingarár

Tróndur Arge

Á heimavølli framman fyri føroyskum fløggum og einum góðum stemningi, taptu Gunnar Nielsen og Manchester City fyri Tottenham. Fyri Tottenham merkir fjórða plássið, at teir sleppa í Champions League fyri fystu ferð í fleiri áratíggju.

Mikukvøldið var lagt upp til tann týdningarmesta dystin í longri tíð hjá Manchester City og Tottenham. Vinnarin kundi bjóða vælkomin til Champions League og ein fíggjarligan vinning upp á eina góða hálva milliard krónur. Luttøkan hjá Gunnari Nielsen í Arsenal dystinum, tá hann avloysti ein skaddan Shay Given í Manchester City málinum, hevur økt um áhugan fyri City liðnum seinast dystirnar, men heldur ikki hesaferð stóð Gunnar í málinum. Hóast tað, so vóru føroysku fløggini frá seinast framvegis at síggja á City of Manchester Stadium. Í dystarblaðnum, sum er at fáa til keyps uttan fyri stadium, er eisini ein ein samrøða við Gunnar uppá fýra síður.

– Eg eri also ikki nøkur stór stjørna, ið verður stegðað og biðin um autografar allastaðni, har eg fari. Vit hava ikki stjørnur upp á tann mátan í Føroyum, sigur Gunnar millum annað við dystarblaðið hjá Manchester City.

Avloysarin hjá Gunnari, Marton Fulop, stóð sum so ein fínan dystin. Hann hevði onkrar góðar bjargingar, men sá eisini eitt sindur ótryggur út í øðrum støðum. Millum annað var Fulop óheppin í málinum, ið Tottenham skoraði. Hann boksaði eitt hart innlegg beint í høvdið á Tottenham framherjanum, Peter Crouch, ið lættliga kundi stúta bóltin í mál.

Eftir dystin tosaði Sosialurin við nakrar Manchester City viðhaldsmenn, ið vóru á einum máli um, at Gunnar skuldi havt staðið í málinum. Serliga nú tá teir ikki megnaðu at koma í Champions League kortini. Spurningurin er nú, um Gunnar fær møguleikan komandi vikuskifti, tá Manchester City í seinasta umfarinum vitjar hjá West Ham.

Sosialurin var eisini á eftirfylgjandi tíðindafundinum. Fyrstur inn var Harry Redknapp, ið er venjarin hjá Tottenham. Hann tók yvir, tá Tottenham í fjør bara hevði fingið tvey stig í teimum fyrstu átta dystinum. Hann var sjálvsagt fegin um at hava rokkið Champions League í ár.

– Vit hava spælt góðan fótbólt í alt ár, og vit hava uppiborið hetta fjórða plássið. Mær dámar væl álopskendan fótbólt. Eitt nú tá Manchester United plagdi at spæla við tveimum vongum og tveimum áleyparum, tað er fótbóltur, mær dámar, segði ein fegin Harry Redknapp við Sosialin og hini fjølmiðlafólkini.

Eftir honum kom venjari hjá Manchester City, Roberto Mancini. Fjølmiðlarnir vóru skjótir at spyrja hann um framtíðina, og um hann nú fór at blíva koyrdur.

– Eg verið venjari aftur komandi ár. Eg havi arbeitt við hesum liðnum í fimm mánaðir, og vit eru komnir langt síðani tá. Eg hevði gjarna vilja verið ein gandakallur, men tað eri eg tíverri ikki, so eg fái ikki broytt støðuna, segði Mancini á tíðindafundinum.

Síðani fundin hevur formaðurin í Mancherster City, Khaldoon Al-Mubarak, sagt, at Roberto Mancini heldur fram sum venjari komandi ár.

– Roberto hevur gjørt eitt stórt arbeiði. Eg eri glaður fyri arbeiðið, hann hevur gjørt fyri felagið. Tað er eigarin, Sheik Mansour, eisini. Vit ivast ikki í, at Mancini kann gera eitt gott arbeiði fyri okkum komandi ár og vónandi nógv ár fram yvir, segði Al-Mubarak við Manchetser City heimasíðuna.

Millum gestirnar á City of Manchester Stadium var enski landsliðsvenjarin, Fabio Capello, sum fekk eina góða móttøku, tá hann kom á stadium. Tíverri slapp hann ikki at síggja Gunnar á vøllinum, men vónandi stendur Gunnar Nielsen í málinum, tá Manchetser City á Upton Park í London vitjar West Ham sunnudagin.

**Eg eri also ikki nøkur stór stjørna, ið verður stegðað og biðin um autografar allastaðni, har eg fari. Vit hava ikki stjørnur upp á tann mátan í Føroyum**

*trondur@sosialurin.fo*